Næsta málið er fast pláss

Jann Ingi Petersen hevur tikið lut í øllum landsdystunum í ár, og nú setir hann sær mál at vinna sær fastan sess á miðvøllinum

LEIKARAPRÁT
Jákup Mørk

Skal tosast um eitt veruligt gjøgnumbrot á landsliðnum í ár, so er tað uttan iva Jann Ingi Petersen úr B68, sum fer avstað við hesum heitinum. Eitt gjøgnumbrot, sum nú eisini hevur slóðað fyri, at leikarin komandi ár verður partur av hópinum hjá danska Fremad Amager.

Men hóast hetta, og hóast hann ofta hevur verið partur av teimum fyrstu ellivu, so hevur hann enn ikki vunnið sær nakað fast pláss á liðnum. Heldur hevur tað verið so, at hann er fyrsti maðurin, sum verður settur inn, tá hol skulu fyllast.

- Mær dámar betur á miðvøllinum, men sjálvandi spæli eg har, sum venjarin metir meg gera størstu nyttuna, heldur Jann Ingi Petersen, sum í ár hevur fingið sítt veruliga gjøgnumbrot á landsliðnum

Mynd: Álvur Haraldsen

- Tað er sjálvandi eitt sindur keðiligt, at man verður koyrdur runt ymsa staðni á vøllinum, uttan at hava nakað veruligt fast pláss at seta seg á. Men higartil havi eg bara verið fegin um, at eg eri sloppin upp í part.

Tað tykist eisini, sum ert tú ein leikari, sum helst skal hava bóltin ofta, fyri at spæla heilt væl. Trívist tú ikki betur á miðvøllinum.

- Jú, tað geri eg heilt sikkurt. Tá hevur tú betri møguleika at spæla framefitir vøllinum. Venda tær og vera við til at seta dám á spælið, so tað er í øllum førum næsta málið. Men hinvegin spæli eg sjálvandi har, sum venjarin metir meg gera størstu nyttuna.

Og at næsta málið hjá unga toftamanninum er at vinna sær fast pláss, er einki at ivast í. Eitt mál, sum hann fyrst og fremst ætlar at røkka við hørðum arbeiði.

- Tað er bara at koyra á. Tað hevur koyrt væl í seinastuni, so um eg haldi fram á sama hátt, so skal tað nokk koma fyrr ella seinni. Tað eri eg sannførdur um, sigur altso Jan Ingi Petersen at enda.

Og at málið verður rokkið, man lítil ivi vera um, kann leggjast afturat. Sjáldan hevur ein nýggjur leikari so skjótt vunnið seg fram í hópinum, sum Jann Ingi gjørdi tað í ár. Og ein framtíð í donskum fótbólti við fleiri dystum og longri kappingarári er uttan iva nakað, sum kann skumpa enn meira undir menning hansara.

Jens Martin heldur fram

Verðið eg framvegis úttikin, so er einki at ivast í, at eg eisini verið á liðnum komandi undankappingina, sigur málverjin, sum tó heldur, at tað enn er nakað eftir á mál hjá føroyskum fótbólti

LEIKARAPRÁT
Jákup Mørk

Einki er at ivast í, hvør stóri veteranurin á føroyska fótbóltslandsliðnum er. Kanska er Jens Martin Knudsen ikki longur tann, sum eigur landsliðsmetið á føroyska landsliðnum, men hann hevur verið við allan vegin. Úr Landskrona umvegis eina rúgvu av føroyskum fótbóltsbýum, og mikudagin var hann so aftur á Svangaskarði, har flestu dystirnir sjálvsagt eru komnir á kontina.

Hetta merkir so sjálvandi eisini, at leikarin nú er komin nakað upp í árini, men málverjar halda vanliga leingi, og sáttmáli hansara við NSÍ er so galdandi í tvey ár afturat. Og hesi bæði árini ætlar Jens Martin so undir øllum umstøðum at taka afturat.

- Eg havi so ongar ætlanir yvir høvur um at gevast. Verið eg úttikin, og kenni eg meg hava neyðuga førleikan til at halda fram, so kemur tað ikki upp á tal at gevast.

Nú hevur tú verið partur av menningini hjá landsliðnum hesi 13 árini, sum vit hava tikið lut í undankappingum. Soleiðis hevur tú helst verið nærmasta vitni til ta menning, sum liðið hevur verið fyri, men hvussu langt heldur tú, at vit kunnu røkka afturat tey bæði næstu árini.

- Nú hava vit sum so akkurát lyft okkum upp á eitt nýtt stoði. Eitt stoði, har tað ikki er talan um hasi tapini við fýra-fimm málum, men har vit kortini eru akkurát ov stuttir til veruliga at gera okkum galdandi. Vit eru ónøgdir, nú vit tvær ferðir hava tapt 3-1, og tað sigur í øllum førum nakað.

- Men hiðani, og so til at fáa neyðugu stigini, er eitt stórt lop. Ikki minst kann skipanin á liðnum ikki vera hin sama, tí vit skulu helst longur fram á vøllin, og her fáa vit ein trupulleika. Vit síggja fleiri ferðir í dag, at tekniska stoðið hjá okkum er ikki nóg høgt, og tað er sum so púrasta logiskt, tí vetrarsteðgurin er ov langur. Stutt sagt, so koma vit ikki nógv longur, so leingi sum leikararnir eru í Føroyum og spæla, ella so leingi sum onkur broyting í heimligu kappingini ikki verður gjørd.

- Vit eru ónøgdir, nú vit tvær ferðir hava tapt 3-1, og tað sigur í øllum førum nakað um menningina, heldur Jens Martin Knudsen

Mynd: Álvur Haraldsen

Føroyski miðvøllurin var oftani spældur tunnur av kviku mótstøðuni, og tí var tað sera trupult hjá okkara monnum at seta seg ígjøgnum í dystinum

Stóran part av dystinum spældi litavsiska liðið ov skjótt, til at okkara fingu fylgt við. Og hetta gav seg eisini aftur í, at fáir av føroysku monnunum spældu upp til sítt allarbesta, tí flestu kreftirnar vórðu nýttar at renna eftir mótstøðumonnum

LEIKARAUMMÆLI
Jákup Mørk

Truplar umstøður

1. Jens Martin Knudsen, NSÍ (59 dystir/0 mál)
Prógvaði enn einaferð, at føroyska landsliðið hevur tveir málverjar í altjóða flokki. Sjálvt um triðja málið var at tí slagnum, sum helst ikki skulu fara inn, so var sera avmarkað, hvat málverjin fekk gjørt við hetta ella nakað av hinum málunum. Hevði hinvegin fleiri góðar bjargingar, og sýndi eisini framúr reaktiónsevni, tá hann ta einu ferðina fór skeivur av frísparki frá Barasa. Tóktist onkra tíð at gera ov skjótt av í avspælinum, men var annars ein av føroyingunum, sum stóð sterkastur í myndini.

2. Hans Fróði Hansen, B68 (26/1)
Fekk aftur møguleikan á landsliðnum, nú Óli Johannesen var úti við skaða, men hevði hesaferð trupult við at staðfesta sína støðu í hópinum. Hevði fyri tað mesta stórar trupulleikar, tá kviku litavarnir fluttu bóltin skjótt úr síðu í síðu, og lat seg eisini lokka til at tøma øki í føroysku verjuni. Høvuðsspælið plagar ofta at viga upp ímóti veikleikunum á jørðini, og tað gjørdi tað í ávísan mun, tó at litavar eisini høvdu ein stóran og sterkan álopsmann. Ivaleyst hevði talan verið um meira hóskandi spæl til Hans Fróða, um dysturin hevði verið móti skotum ella íslendinguum.

3. Súni Olsen, GÍ (11/1)
Við kanska vakrasta málinum í altjóða fótbóltssøguni hjá Føroyum fekk Súni eina løtu alt Svangaskarð upp at kóka. Í spælinum á vøllinum var tó í løtum sera trupult hjá honum at halda spælinum uppi á sama trýsti. Kanska tí hann sum hin fyrsti fekk at kenna lítla tolið hjá dómaranum. Tóktist eins og mótstøðumenninir at hava stórar trupulleikar við at standa á vøllinum, og lat seg eisini yvirspæla nakrar ferðir. Men málið verður í øllum førum standandi í minninum í langa tíð.

4. Pól Thorsteinsson, B36 (31/0)
Var gjøgnum tað mesta av fyrra hálvleiki ein av stinnastu føroysku leikarunum. Vardi sum vant væl fyri í sínari síðu, og flestu bóltarnir frameftir, høvdu eisini ein móttakara. Fekk ein ordans bakkaláara, sum seinni noyddi hann av vøllinum, men hevði fram til tá verið ein av allarbestu føroysku leikarunum.

5. Jón Rói Jacobsen, Brøndby IF (15/0)
Framdi kanska sítt fyrsta mistak í allari undankappingini, tá hann av misgávum kom at verða partur av uppspælinum til fyrsta litaviska málið, og eina løtu tóktist hetta eisini at kosta stóran part av sjálvsálitinum. Fekk tó serliga í seinna hálvleiki spælt seg upp, og kom í so máta væl frá dystinum. Slapp seinastu løtuna at royna seg í álopinum, men hevði tá millum lítið og einki at arbeiða við.

6. Jann Ingi Petersen, B68 (7/0)
Varð tikin framum Rógva Jacobsen á miðvøllinum. Uttan iva vegna góðu fótbóltsevnini, og í fyrra hálvleiki prógvaði hann partvíst, at hetta var rætt disponerað av venjarunum. Noyddist í seinna hálvleiki oman á bakkan, tá skaðin hjá Pól Thorsteinsson viðførdi eina størri rokering, og hetta setti avgjørt sín dám á seinna hálvleik. Er tó helst frægasta alternativið á bakk-plássinum í løtuni, men er samstundis heilt greitt ein spælari, sum skal hava nógva bóltkontakt, skal hann spæla upp til sítt besta.

7. Fróði Benjaminsen, B68 (24/1)
Hevði ein RISA møguleiki longu eftir fyrstu fáu minuttunum, men fekk ikki bóltin framvið verjuleikaranum á málstrikuni, og tóktist eina løtu at missa pippið av hesum. Spældi seg gjøgnum fyrra hálvleik væl uppaftur, og var við í nógvum av tí, sum føroyska liðið skapti. Seinna hálvleik hevði hann tíverri í alt ov stóran mun lyndi til at glíða heilt burturúr spælinum. Ivaleyst tí litavar koyrdu bóltin ov skjótt kring føroyska miðvøllin.

8. Julian Johnsson, ÍA Akranes (54/4)
Avgjørt ikki ein av bestu landsdystunum hjá Julian. Serliga meðan hann var í vinstra borði tóktist væntandi vinstra beinið at vera eitt handicapp, og evni hansara sum bóltvinnari komu heldur ikki nóg væl til sín rætt her. Varð seinni fluttur inn á miðvøllin, men kom her ongantíð heilt fyri seg, og hevði hópin av skeivum sendingum. Fekk tó einstakar ferðir sett ferð á við eyðkenda drive'num, men tíverri ikki í nóg stóran mun.

9. Jákup á Borg, B36 (30/1)
Var fyri tað mesta ein av mest eyðsýndu føroysku leikarunum. Ikki minst fyrstu løtuna, tá Føroyar spældu við trimum á toppinum, men eisini seinni fór stórur partur av føroysku álopunum upp gjøgnum hansara síðu. Hevur eisini neyðuga kvikleikan til at seta menn av á hesum støðinum, og kann tí sum ein av teimum fáu skapa yvirtalsstøður. Hinvegin hevur hann tíverri framvegis lyndi til at bíða ov leingi við innleggunum, tá bólturin helst skal smekkast innfyri alt fyri eitt.

10. John Petersen, B36 (50/6)
Hótti fyrstu løtuna við at gera sín 50. landsdyst til ein av sínum allarbestu, tá hann var við í sera nógvum sum ein av trimum føroyskum álopsmonnum. Er tó ein leikari, sum skal hava nógva bóltkontakt, og tá trýstið síðani varð flutt longur aftur, var John tí ikki eins eyðsýndur seinni í dystinum. Var tó oftani drúgvur, tá langir bóltar vórðu sparkaðir niðan, og var eisini maðurin, sum vann málgevandi frísparkið. Týdningur hansara fyri spælið frameftir vøllinum er tó stórur, og tí er bara at vóna, at tað eisini verður til nakrar dystir komandi árini.

11. Christian Høgni Jacobsen, Vejle BK (19/2)
Var hesa ferð maðurin, sum fekk plássið við síðuna av John, og tó at hann ikki skoraði, so er í løtuni alt at finna nakað annað upplagt boð til plássið. Royndi nakrar ferðir at bjóða av, og var eisini um reppið at beina eitt hornaspark í kassan, men hevði sum heild sera truplar arbeiðsumstøður, og fekk tí ikki í nóg stóran mun sett sín dám á dystin.

12. Rógvi Jacobsen, HB (24/3)
Var hesa ferð settur á beinkin, men fekk so seinastu 40 minuttirnar á vinstra miðvølli. Tóktist brúka sera langa tíð um at finna seg til rættis í spælinum, men fekk móti endanum nakrar ferðir arbeitt seg niðan á vøllin, soleiðis at nøkur vandamikil innlegg spurdust burturúr.

15. Atli Danielsen, KÍ (3/0)
Fekk seinastu fimm minuttirnar á vøllinum. Ov lítið til at gera nakra ítøkiliga meting, men hevði eitt gott driva niðan eftir vøllinum, meðan hann í hinum endanum – nakað bíliga – fekk seinasta málgevandi frísparkið ímóti sær.

17. Tór-Ingar Akselsen, HB (2/0)
Fekk seinastu 12 minuttirnar á vøllinum fyri Jákup á Borg, men grundarlagið til eina meting var ov veikt. Tvær innskiftingar á rað benda tó á álit frá venjarunum, so uttan iva var talan ikki um seinasta møguleikan í hesum høpi.